# Skjótur svanur

Við hjálp frá GPS-útgerð hava skotsk vísindafólk fylgt við svanum, sum hava flogið úr Íslandi til Skotlands. BBC sigur, at tann fyrsti svanurin, sum bleiv kannaður, brúkti 14 tímar til teir 800 kilometrarnar. Teir seinastu 25 kilometrarnar fleyg svanurin upp á 15 minuttir. 49 aðrir svanar eru merktir við somu útgerð, og nú bíða vísindafólkini bara eftir, at teir koma til Skotlands. Endamálið við kanningunum er at fáa staðfest ferðaleiðina hjá svanunum í sambandi við, at ætlanin er at seta vindmyllur upp fram við skotsku strondini.





*Spurningurin um pelagiska tilfeingið, sum Føroyar eiga, hevur verið nógv frammi í seinastuni. Nú bendir nógv á, at dagurin ikki er so langt burtur, tá partar av hesum tilfeingi aftur kunnu landast til matna í Føroyum*

# Kollafjord Pelagic letur helst uppaftur

**Arbeitt verður nú við at lata Kollafjord Pelagic uppaftur. Bæði Jógvan Emil Nielsen og Kristian Petersen í Eik Banka vátta, at samráðingar eru við eitt stórt hálendskt felag um leigu av stóra pelagiska virkinum í Kollafirði**

VINNULÍV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv bendir nú á, at Kollafjord Pelagic fer at lata uppaftur við hálendskum pengum.

Hálendska felagið, sum herfyri setti pengar í verkætlanina við nýggja Nærabergi hjá JFK-Troli, er nú í samráðingum við Eik Banka um leigu av stóra pelagiska virkinum í Kollafirði.

## Samráðingar

Bæði Jógvan Emil Nielsen og Kristian Petersen í Eik Banka, sum eigur virkið í Kollafirði, vátta, at ein avtala við hálendska felagið er við at verða undir landi.

Teir siga, at soleiðis, sum samráðingarnar hava gingið, er væntandi, at ein endaliga avtala millum partarnar er undir landi heilt skjótt.

Avtalan fer helst at byggja á, at hálendska felagið fer at leiga virkið í Kollafirði og rakstrargøgnini í bygninginum við forkeypsrætti.

Talan er um tvey feløg, ið hava tilknýti til virksemið, sum var í Kollafirði. Annað er ognarfelagið Faroe Real Estate, og hitt er Kollafjord Pelagic, sum er rakstrarfelagið.

## Landa til matna

Kemur henda ætlan undir land, sum Jógvan Emil Nielsen og Kristian Petersen í Eik Banka vænta, bendir alt á, at dagurin ikki er langt burtur, tá ein partur av pelagiska tilfeinginum, sum føroyingar eiga, aftur kann landast sum matvøra í Føroyum.

Spurningurin um pelagiska tilfeingið, sum Føroyar eiga og veiða, hevur verið nógv frammi seinastu dagarnar, og tí má henda nýggja og ætlaða verkætlanin í Kollafirði, sigast at verða kærkomin.

# Ein stuttur fundur um nýggjan sáttmála

SAMRÁÐINGAR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Hóast sáttmálin millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag gongur út 1. desember í ár, hevur bert ein stuttur fundur verið millum feløgini.

Tað er Fiskimannafelagið, sum hevur sagt sáttmálan við reiðararnar upp. Onnurmanningarfeløg hava ikki sagt upp sínar sáttmálar við Reiðarafelagið á hesum sinni.

Ein stuttur fundur var millum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið fyri góðari viku síðan, men síðan hava reiðararnir einki hoyrt aftur frá Fiskimannafelagnum, og eingin nýggjur fundur er avtalaður.

Formaðurin í Reiðarafelagnum, Viberg Sørensen, sum í hesum døgum er á aðalfundi hjá NEAFC í London, sigur, at felagið bíðar eftir fundarboðum frá Fiskimannafelagnum.

- Vit hava ikki sagt sáttmálan upp, og tí vænta vit, at tað verður Fiskimannafelagið, sum tekur stig til næsta fundin.

Viberg Sørensen sigur, at enn hevur reiðarafelagið ikki sæð nakað ítøkiligt um, hvørji ynski Fiskimannafelagið hevur í einum nýggjum sáttmála, men hann heldur, at talan eru um onkrar reguleringar.

- Vit hava ikki sagt sáttmálan upp, og tí hava vit heldur ikki sett fram nøkur krøv um serstakar broytingar í einum nýggjum sáttmála, sigur Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum.